

## Jensen og Mejdahl út

Danski Fólkaflokkurin vil hava minst tveir nýggjar limir í donsk-grønlendsku sjálvsstýrisnevndina. Flokkurin heldur, at Frank Jensen og Christian Mejdahl eiga at fara úr nevndini, tí teir eru ikki í Fólkatinginum longur. Hvørgin teirra stillaði upp til valið herfyri. Kristian Thulesen Dahl, sum er formaður í tingbólkinum hjá Danska Fólkaflokkinum, sigur við JyllandsPostin, at bara fólkatingslimir eiga at vera í sjálvsstýrisnevndini.

# Reyði Krossur veitir 300.000 til kreppurakt



*- Altjóða Reyði Krossur, sum hevur høvuðssæti í Geneve, setir upp eina ætlan um neyðhjálpararbeiði, og tað er Dansk Røde Kors, sum syrgir fyri, at penigurin úr Føroyum kemur á rætt stað og soleiðis til tey kreppuraktu fólkini, sigur Súni Vinther*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ein fittur partur av teimum 450.000 krónunum, sum innsavningin hjá Reyða Krossi gav nakrar tímar ein leygardag fyrr í heyst, verður nú sendur vanlukkuraktum fólki í Bangladesh, Karibiu og Afriku**

NEYÐHJÁLP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Reyði Krossur Føroyar hevur gjørt av at játta 300.000 krónur í neyðhjálp. Av hesum fara 200.000 til Bangladesh, 50.000 til Karibiu og somuleiðis 50.000 krónur til Afriku.

Súni Vinther, dagligur leiðari hjá Reyða Krossi Føroyar, sigur, at neyðhjálpin til Bangladesh verður veitt í sambandi við oyðileggjandi illveður, sum hevur rakt landið, og sama er galdandi fyri Karibiu. Hjálpin til Afriku fer til fleiri lond, sum eru vorðin yvirfloymd av regni.

-Hesar 300.000 krónurnar koma frá innsavingini við bússunum, sum skipað varð fyri ein leygardag fyrr í heyst. Innsavningin gav umleið 450.000 krónur og var ætlað vanlukkuraktum økjum úti í heimi.

Hann sigur, at Reyði Krossur Føroya vildi leggja uppfyri – um vit so kunnu siga - við hesi innsavning, tí tað er eingin hjálp, um felagsskapurin situr við tómum pengakassa, tá katastrofurnar raka.

- Eftir innsavningina fór hesin peningur beinleiðis á kontu til kreppurakt øki, og nú hava vit so gjørt av, hvar hesar 300.000 krónurnar skulu brúkast, sigur Súni Vinther.

### Tú fylgir við

Tað er Dansk Røde Kors, sum syrgir fyri, at penigurin kemur á rætt stað og soleiðis til tey kreppuraktu fólkini.

- Altjóða Reyði Krossur, sum hevur høvuðssæti í Geneve, setir upp eina ætlan um hjálpararbeiði. Felagsskapurin fylgir væl við, hvussu peningurin verður brúktur, og seinni kunnu fólk eisini lesa í frágreiðing á heimasíðuni, hvar peningurin fór.

Súni Vinther sigur, at øll kunnu fara inn á føroysku heimasíðuna www.redcross.fo og lesa um hjálpararbeiði, og haðani verður eisini víst til leinkjur hjá eitt nú Altjóða Reyða Krossi og nationalu felagsskapunum í fleiri ymiskum londum.

### Takksamur leiðari

- Eg vil nýta høvi at takka øllum, bæði teimum, sum hjálptu okkum við at fyriskipa innsavningina, teimum, sum savnaðu inn fyri okkum – og ikki minst øllum teimum mongu, sum lótu eitt oyra til neyðhjálpararbeiði, sigur ein takksamur dagligur leiðari í Reyða Krossi Føroyar, Súni Vinther.

# Hjálp til foreldraleys í Zimbabwe



*Í Zimbabwe eru nógv foreldraleys børn, sum hava mist síni foreldur av herviligu sjúkuni aids*

**Reyði Krossur Føroyar fer fyri fyrstu ferð at skipa fyri jólamarknaði, sum verður 1. desember hølunum í Vágsbotni**

FORELDRALEYS

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at Reyði Krossur Føroya er ein aktivur felagsskapur, sum eitt nú skipar fyri nógvum innsavningartiltøkum til frama fyri neyðstødd og kreppurakt kring um heimin.

Og nú 1. desember er aftur eitt tiltak á skránni, har felagsskapurin fer at skipa fyri jólamarknaði í hølunum í Vágsbotni.

Súni Vinther sigur, at marknaðurin, sum bert verður hendan eina dagin, letur upp klokkan 10 og verður opin til klokkan 15.

- Endamálið við marknaðinum er at útvega pening til 35 foreldraleys børn í Zimbabwe. Tað er soleiðis, at føroyski parturin av Reyða Krossi syrgir fyri, at 35 foreldraleys børn í Zimbabwe fáa mat, klæði og skúla. Í fleiri førum eru foreldrini deyð av sjúkuni aids.

Hann sigur, at Reyði Krossur Føroya í nøkur ár soleiðis hevur syrgt fyri at lívbjarga 35 børnum í landinum, og tað eru eisini fólk og stuðlar, sum rinda eitt ávíst mánaðargjald júst til hetta arbeiði.

- Hetta hjálpararbeiði kostar umleið 4.000 krónur um mánaðin, og í løtuni vantar okkum pening. Tí fara vit vit nú 1. desember at skipa fyri jólamarknaði, har ein øðrvísi loppumarknaður verður á skránni. Vit vóna, at vit við hesum fáa tað íkast, sum vantar í.

Súni Vinther sigur, at eitt nú jóladekoratiónir kunnu keypast á marknaðinum, og eisini verður bakstur av ymiskum slagi, umframt annað, sum plagar at draga fólk til ein slíkan forvitnisligan marknað.

- Tað er soleiðis, at Reyði Krossur kring um heimin miðjar eftir at hjálpa tilsamans 53.000 foreldraleysum børnum í Zimbabwe, og hesi 35 eru so okkara partur í verkætlanini, sigur dagligi leiðari í Reyða Krossi Føroyar.